gult26 cyan26 magenta26 svart26



# Tónleikur fingið føroyskt heimstað á netinum

**Trýst teg inn á pop.fo á netinum, og tú ert inni á nýggja heimstaðnum fyri tónleik, har tónleikur, tíðindi og annað eru at finna. M.a. er áhugaverd kanning millum tey vitjandi, ið vísir meiriluta fyri, at landskassin stuðlar útflutningi av tónleiki og er hetta áhugavert, nú landsstýrismaðurin í vinnumálum eisini hevur sagt seg vera fyri slíkum hugsanum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Tann 2. mai var bert ein av óivað fleiri nýggjum heimasíðum fyri fyrstu ferð á netinum. Heimasíðan pop.fo sá dagsins ljós, og er tað manningin handan Studio Pegasus í Klaksvík, ið stendur aftanfyri.

Við heimasíðuni hevur føroyskur tónleikur fingið ein kliva á netinum. Tónleikur, upplýsing og ikki minst tíðindi eru at finna á síðuni, ið tykist áhugaverd.

Umboð fyri manningina aftanfyri hevur sagt, at ætlanin er at nýta teir møguleikar, ið alnetið hevur sum miðil framum gomlu, kendu miðlarnar.



### Frumframførsla

Í sær sjálvum hevur síðan verið ein frumframførsla, nýhugsan. Men sum nakað av tí fyrsta, kundi síðan við einkarætti bjóða teim vitjandi tónleik frá nýggju fløguni við All That Rain. Hetta var frumframførsla. Her var síðan fyrst, tí tónleikurin var at hoyra á pop.fo, áðrenn tónleikurin og fløgan gjørdust almenn.

Hervið hevur pop.fo staðfest seg sum tíðindamiðil, ið roynir at verða fyrst við tí nýggjasta.

### I Am til Noregs

Nakað annað, sum pop.fo avdúkaði er, at gospelbólkurin úr Klaksvík, I Am, er boðin á festival. Og talan er um størsta gospelfestival í Norðurlondum og hesin er í Noreg.

Eisini tíðindini um avlýstu konsertina hjá Jerusalem komu fyrst á pop.fo.

Mangt forvitnisligt er fyri tónleikaáhugað. Síðan er virkin á tíðindaøkinum. Fimtan tær bestu eru at síggja á síðuni, eins og síðan vísir 10 teir fremstu sangirnar á føroyska Poptop listanum.

### Kanning

Síðan hevur eisini eina kanning. Aktuelli spurningurin er, hvørt tikið verður undir við, at landskassin stuðlar útflutningi av føroyskum tónleiki.

Fyrst í vikuni høvdu 646 vitjandi greitt atkvøðu. 62,1% søgdu seg vera fyri, 29,6 % ímóti og 8,4% vistu ikki.

Spurningurin og svarúrslitið er áhugavert, nú Prix Føroyar er farið aftur um bak, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, hevur sagt seg taka undir við hugsanini, at slíkur útflutningur verður stuðlaður.

Manningin handan Pegasus í Klaksvík hevur langt síðani prógvað seg og sínar eginleikar og hevur lagt rygg til ein kreativan orkudepil. Pegaus byrjaði sum upptøkustudio, síðani spruttu m. a. Kular Røtur burtur úr og síðani sendingarnar, sum vit kenna úr Útvarpi Føroya sunnukvøld.

Nú er so lagt afturat og sum ein nýggj – grøn – grein á vaksandi stammui er heimasíðan pop.fo komin.

---

Frá: Turid Mørkøre, turid.morkore@akvaforsk.nlh.no

**TELDUBRÆVIÐ**

Dagur 17.05.01

Til: eirikur@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

# Villar norskar pisur

Meðan norðmenn flestir fyrireika seg til tjóðardagin 17. mai, so halda tær norsku pisurnar sær á gleimi. Og tað gongur vilt fyri seg.

Í Noreg er fyribrygdið studentaskúli burtur, meðan tað vit forbinda við studentaskúla verður rópt »Videregående skole«. Har kann man lesa alt frá heilsufak, frisørfag hondverkarafak, aling o.s.fr., men eisini tey upprunaligu »almennfakini«, sum norðmenn rópa tey: mál, matematikk, fysikk o.s.fr. Avgangsnæmingarnir, ella pisurnar, ið ganga á handilsskúla verða róptir »blá-russ«, meðan hini eru »rødruss«.

Tær norsku pisurnar ganga ikki í hattum eftir at tær hava lokið prógv, men í reyðum ella bláðum ketildraktum ella smekkubuksum og keppum í nakrar vikur fram til 17. mai, sum er tjóðardagur Noregs. Á teimum reyðu og bláu búnunum stendur skrivað, hvørjum skúla næmingarnir koma frá, onkur vísdómsorð, autografurin frá onkrum klassavini og kanska hondavtrikkið frá eini unnustu.

Pisurnar ganga soleiðis ílætnar í einar tvær vikur fram til tann 17. mai. Próvtøkuna hava flestu pisur ikki stundir at hugsa um fyrr enn aftaná feiringina.

Tær ófloygdu pisurnar koyra í gomlum stórum bussum, sum eru málaðir reyðir ella bláðir, og sum eru prýddir við ymiskum áskriftum, málningum og onkrum reklamum. Á takinum hava hesir bussarnir stórar hátalarar, sum fyri hvørt ár gerast alsamt størri og sterkari. Vanligt er eisini, at bussarnir hava ein tilhangara til streymaggregatið til tónleikaannleggið – og tað hoyrist, tá ein »russ«-bussur er í nærheitini.

Hvør »russ« hevur eitt visittkort, sum børnini kappast um at fáa. Á hesum kortinum er oftast ein mynd av viðkomandi, navnið og upplýsningar um, hvørjum skúla viðkomandi gongur á – og ikki minst okkurt vísdómsorðið. Eitt dømi uppá eitt slíkt er: »Pilsen kommer ikke til deg, du må komme til pilsen«.

Pisurnar hava eisini eina kapping sínamillum. Henda kappingin gongur út uppá at fáa flest møguligar knútar og ting fest í keppin. Eitt av tingunum, pisurnar kunnu fáa í keppin, er ein proppur frá einum uppvaskidunki. Proppurin vísur til, at viðkomandi hevur svomið, ella baðað, í einum springvatni við uppvaskisápu í – nakin. Tískil er tað eisini vanligt, at øll springvøtn í Oslo eru full av skúmi tann 17. mai.

Tann 16. mai er hæddarpunktið av festini. Tá er tað mesta loyvt, og fyri mong blívur náttin bæði long og váttlig. Tann 17. mai masjera tær ófloygdu pisurnar aftast í gonguni, og hvørt ár verður sagt, at ongantíð hevur tað verið verri og villari enn tað sama.

gult27 cyan27 magenta27 svart27




T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Leiðari

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir leiðara, 40 tímar um vikuna, til frítíðarskúlan á Argjum.

**Stovnslýsing**
Frítíðarskúlin liggur í einum sera náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi. Á stovninum eru 36 børn, sum ganga í 1. flokki í Argja skúla.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunur)
- kann arbeiða sjálvstøðugt, og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum frítíðarskúla
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogisk arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag merktan av virðing fyri foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika

**Lønarviðurskifti**
Starvið verður sett 1 august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. juni 2001. Viðmerk á umsóknina "Leiðari"

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til Býlingshúsið undir Fjalli.

**Størvini**
Talan er um trý pedagogstørv, 30 tímar um vikuna, í barnagarðsstovu við 20 børnum og tvey pedagogstørv, 30 tímar um vikuna, á vøggustovu við 12 børnum.

**Stovnslýsing**
Í Býlingshúsinum undir Fjalli ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðstovum við 20 børnum og eini vøggustovu við 12 børnum.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Vit ynskja**
at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 6. august 2001 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Katrina Joensen, leiðara, tlf. 31 46 65, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjallsgøta 25, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 11. juni 2001.

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Minnisgrunnur Sonnu av Skarði

**Stuðul til teirra, ið søkja sær útbúgving í handarbeiðið.**

Á hundrað ára føðingardegi Sonnu av Skarði tann 19. apríl 1976 stovnaði Tórshavnar kommuna "Minnisgrunn Sonnu av Skarði".

Endamál grunsins er at menna og lívga føroyskt handarbeiði, føroyska handarbeiðsmentan og veita fólki, sum fáa sær handarbeiðsútbúgving í tóvirki (tekstil), fíggjarligan stuðul.

Tygum fáa meira at vita um minnisgrunnin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og framtíðarætlanir í tóvirkisútbúgving skal sendast Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, merk "Minnisgrunnur Sonnu av Skarði".

Freistin er sett til 11. juni 2001.

S N A R S K I V A N

## Aðalfundur

Vísandi til grein 15 í Lógum fyri Ítróttasamband Føroya, verður hervið lýst til aðalfund í Ítróttasambandi Føroya at verða 16. juni 2001.

Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

**Ítróttasamband Føroya**

Til handilin við Hoyvíksvegin og Gripsvegin verður søkt eftir fyrikomandi

## Krambakvinnu

Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Andreu.

BAKARÍIÐ
HJÁ GUNLEIVI
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 22 51 60 ella 31 21 61

## Sjúkrakassin

er stongdur vegna feriu. Opið verður aftur 30. mai.

**Suðuroyar Sunnari Sjúkrakassi**

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**